VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og møguliga sirm eitt skifti, men annars turt og sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin milum 15 og 18 stig.



Veðrið mikudagin og hósdagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 20 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 16 og 20 stig.

Juni var líggjari enn miðal, 9,8 stig móti 9,0 stig.

Avfallið var 57,8 mm, móti 66,0 í miðal.

DAGSINS FØROYINGUR:

"Tað er tungt bara at liva av SU"

Kristjan Madsen, 24, er kollfirðingur og lesur til el-innleggjara í Danmark. Í løtuni er hann heima, og leygarkvøldið var hann til fiskikapping á Eiði

ORÐ & MYND
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Hvussu hevur gingið at fiska í kvøld?
- Tú tað er eitt sindur ringt at siga. Eg hugni mær óført, men tað er synd at siga, at eg havi fiska nógv. Skal eg siga sum er, so havi ikki so frægt sum tikið tráuna fram enn.

Hvat gert tú í Danmark?
- Eg eri útlærdur elektrikkari, og í løtuni lesi eg víðari til el-innleggjara. Eg havi gingið eitt ár á TEC (Teknisk Erhverv Center, blðm.), og nú er bara eitt ár eftir.

Hvat dámar tær tað?
- Mær dámar óføra væl. Eg búgvi á Amager saman við unnustuni, og vit bæði eru fallin sera væl til í Danmark.

Hvat gert tú so nú tú ert heima?
- Vit skulu bara vera heima í fýra vikur, so vit koma avgjørt ikki til at keða okkum. Eg skal út við gomlu floksfeløgunum, vera saman við vinfólki og vitja familju. Eisini er ætlanin at arbeiða eitt sindur, tí tað er tungt bara at liva av SU.

Ætlar tú at vitja nøkur tiltøk?
- Ja tað er so púra sikkurt. Har er so nógv at fara til, men eg havi so avgjørt at fara á Summar Festival og G! Sjálvandi eisini á ólavsøku, og har skal eg rógva oldboysróður við Greivanum.

Hvørjum vilt tú heilsa?
- Øllum vinum og kenningum og ynskja teimum eitt frálíkt summar. Og so vil eg eisini senda eina serliga heilsu til Magnu, unnustu mína.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	8
Qaqortoq	7
Ammassalik	10
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	12
Aberdeen	18
London	24
Tromsø	--
Bergen	14
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	20
Helsinki	21
Moskva	30
Berlin	26
Warzawa	32
Kiev	29
Bukarest	28
Paris	27
Madrid	31
Róm	30
Malorca	30
Athen	29
Malta	30
Tunis	30
Beijing	28
New Dehli	32
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	13
New York	28
Miami	25
Los Angeles	24
Meksikobýur	23
Panama	30
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1014 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum týsdagin.



Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og hitabrúgvin við Føroyar fer spakuliga norðureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 12/7 kl. 06^{00}– 13/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2 mm – mált frá 12/7 kl. 06^{00}– 13/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 33,6 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

www.sosialurin.fo

GEVID BLÓÐ

VESTFALLSKYRRINDI

17. juli — Seinna kvarter — Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
15. Juli	10.54	23.16	09.54	22.16	10.09	22.31	00.30	12.54	01.30	13.54	09.09	21.31	08.09	20.31	11.09	23.31	-	12.09	10.39	23.01	11.54	-
16. Juli	11.39	-	10.39	23.31	10.54	23.46	01.16	13.39	02.16	14.39	09.54	22.46	08.54	21.46	11.54	-	00.31	12.54	11.24	-	00.16	12.39
17. Juli	00.31	12.52	11.52	-	-	12.07	02.31	14.52	03.31	15.52	11.07	-	10.07	23.01	00.46	13.07	01.46	14.07	00.16	12.37	01.31	13.52
18. Juli	01.46	14.06	00.46	13.06	01.01	13.21	03.46	16.06	04.46	17.06	00.01	12.21	11.21	23.45	02.01	14.21	03.01	15.21	01.31	13.51	02.46	15.06
19. Juli	02.30	14.54	01.30	13.54	01.45	14.09	04.30	16.54	05.30	17.54	00.45	13.09	-	12.09	02.45	15.09	03.45	16.09	02.15	14.39	03.30	15.54

5 707265 100029 >